Landssjúkrahúsið



# Vælkomin á Føðideildina

Tlf. 304500

- spyr eftir vakthavandi ljósmóðir

# Innihaldsyvirlit


Vælkomin á Føðideildina .... 3
Vegleiðing .... 4
Tá ið barnið er føtt .... 5
Fyrstu 2 tímarnar .... 5
Móðurmjólk .... 6
Mjólkarúrdráttur .... 7
Teir komandi tímarnar/dagarnar .... 7
Tekin hjá barninum .... 8
K-vitamin .... 8
PKU .... 8
Vekt .... 8
Innleggingar-og útskrivingarsamrøða .... 9
Hoyrikanning/skreening .... 9
Hvíld .... 9
Undirvísing á deildini .... 10
Eftirføðingarvenjing og vegleiðing .... 10
Vitjan á deildini .... 10
Vitjanartíð .... 11
Fyrispurningar frá avvarðandi .... 11
Fartelefon, fartelda, ipad .... 11
Virðislutir .... 12
Royking .... 12
Reinføri .... 12
Máltíðir .... 12
Upplatingartíðir hjá sølubúðini í forhøllini .... 13
At hava við .... 16

## Vælkomin á Føðideildina

Starvsfólkið á Føðideildini ynskir tykkum hjartaliga vælkomin á Føðideildina.

**Á Føðideildini eru:**

- Føðistovur
- Barsilsdeild
- Neonatalstova/Pinkustova
- Sjúkar barnakonur
- Frískar/sjúkar mammur
- Frísk-, sjúk og ov tíðliga fødd børn

## Innlegging

Ring altíð áðrenn tit koma á Føðideildina.
Um tað er fyrsta barnið, og tú hevur fingið verkir, so er tað skilagott at bíða heima, til tað eru fimm minuttir ella minni ímillum  verkirnar, og tað hevur verið soleiðis í ein tíma.
Um tú hevur átt fyrr, eigur tú at fara fyrr enn so á Føðideildina.
Um fosturvatnið fer, eigur tú altíð at ringja. Í flestu førum verður tú biðin um at koma á deildina til kanningar. Um tað er náttartíð og alt er, sum tað eigur at vera - so kunnu tit vera heima, til tað verður dagur, ella til tú hevur fingið verkir.
Um tit eru í iva, ella um tit hava varhuga av, at alt ikki er, sum tað eigur at vera, so eru tit eisini vælkomin at ringja og tosa við vakthavandi ljósmóðir.

## Telefon nr.

Landssjúkrahúsið tlf. nr.: 304500—spyr eftir vakthavandi ljósmóðir.

## Móttøka

Á Føðideildini verður tú kannað av ljósmóðir, sum metir um tú skalt innleggjast, ella um tú kanst fara heim aftur.

## Mynda og filmsupptøka

Mynda og filmsupptøka á føðistovuni, skal gerast í samráð við ljósmóðrina.
Tað er **ikki loyvt** at taka myndir ella gera upptøkur á skurðstovuni ella í kanningarrúminum.



## Vegleiðing

Eins og mamman, hevur pápin ein sera týdningarmiklan leiklut í øllum viðurskiftum sum viðvíkur barninum—bæði tá tað snýr seg um bróstageving og onnur praktisk viðurskifti. Vit vilja gera okkara til, at pápin fær møguleika, at læra barnið at kenna frá byrjanini, taka sær av grundleggjandi tørvinum hjá barninum, umframt at hann kann stuðla og verða um mammu og barn. Kanningar vísa, at leikluturin/vitanin hjá pápanum um júst bróstageving, hevur alstóran týdning fyri, um mamman gevur bróst, hvussu leingi hon gevur bróst og hvussu tað gongur við bróstagevingini í heila tikið. Kanningar vísa, at bróstagevingin eydnast betri, um pápin stuðlar.

Røktarstarvsfólkið vegleiðir tykkum um bróstageving, røkt og ansing av barninum við atliti til tætt samband millum tykkum og barnið, menning, reinføri og sjúkufyribyrging.

Tá tit skulu skifta á barninum fyrstu ferð, er møguleiki at fáa vegleiðing frá røktarstarvsfólkunum.
Tit hava í boði, at vit vegleiða tykkum, tá barnið fer í bað fyrstu ferð. Tit avgera sjálvi, um tit taka av tilboðnum.

Mamman fær vegleiðing um reinføri í samband við, at tú hevur átt. Heilsu– og sjúkrarøkt verður annars givin eftir tørvi.

Um mamman av einari ella aðrari orsøk, ikki ynskir at geva bróst, so stuðla vit tær og vegleiða tykkum hesum viðvíkjandi.



## Tá ið barnið er føtt:

## Fyrstu 2 tímarnar

Vit vilja mæla tykkum til, um umstøðurnar loyva hesum, at mamman hevur barnið liggjandi hjá sær húð-móti-húð teir fyrstu 2 tímarnar, og helst í longri tíð.
Kanningar vísa, at tað eru nógvir fyrimunir við, at nýføddа barnið sleppur at liggja húð-móti-húð hjá mammuni teir fyrstu tímarnar. Hetta er m.a. gott fyri móðir-barn sambandið og bróstagevingina. Eisini vísa kanningar, at húð-móti-húð ger sítt til at barnið grætur minni, heldur ein støðugari hita, andadrátt og blóðsukur. Tískil mæla vit til

og vilja virka fyri, at hetta verður gjørt. Um mamman vegna t.d. sjúku ella keisaraskurð ikki hevur møguleika fyri at hava barnið hjá sær húð-móti-húð, vilja vit mæla til at pápin leggur barnið húð-móti-húð hjá sær, til mamman er før fyri hesum. Kanningar vísa, at húð-móti-húð hjá pápanum hevur eina jaliga ávirkan á hitan og grátin hjá barninum, eins og tað styrkir pápa-barn sambandið.

Barnið verður lagt til brósti so skjótt, sum tað vísir áhuga fyri tí og so skjótt, sum mamman er klár til hetta.

Í flestu førum kannar, vigar og mátar ljósmóðirin barnið innan 2 tímar eftir føðingina.



Tann fyrsta løtan aftaná føðingina er ein heilt serlig løta, og tí mæla vit til, at bíða verður við at fáa vitjan.

## Móðurmjólk

Tá ið barnið er føtt hevur tú mjólk, rámjólk, sum er lagað til tørvin hjá júst tínum barnið teir fyrstu dagarnar, bæði tá viðvíkur mongd og innihald. Tað sum eyðkennir rámjólkina, er høga innihaldið av proteinum og andevnum, sum m.a. er við til at verja barnið ímóti ígerðum. Eitt afturat, sum eyðkennir rámjólkina, er liturin, sum kann vera gulur, klárur ella hvítur. Hóast mjólkamongdin er lítil, so nøktar hon tørvin hjá tínum barnið, um tú letur barnið súgva so ofta og leingi, sum tað hevur tørv á at súgva.

Tríggir faktorar, sum hava týdning fyri at fáa eina góða byrjan við bróstagevingina: 1) Tíðliga - at barnið verður lagt til bróstið so skjótt tað vísir áhuga at vilja súgva. 2) Ofta - at barnið verður lagt til hvørja ferð og so skjótt sum tað vísir tey fyrstu tekini um at vilja súgva (sí s.8). 3) Effektiv bróstageving - at barnið sýgur væl og rætt hvørja ferð tað sýgur.

## Mjólkarúrdráttur

Um tú av einari ella aðrari orsøk ikki gevur bróst, ella barnið bæði fær bróst og fløsku, so stuðla vit tær og vegleiða tykkum hesum viðvíkjandi. Vit kunnað og vegleiða tykkum um mjólkarúrdrátt, sløg av fløskum/pattum, at blanda mjólk, mjólkamongd, haldføri, reinføri o.s.fr. Vegleiðing verður givin eftir tørvi og ynski.



## Teir komandi tímarnar/dagarnar

Tit hava barnið hjá tykkum alt samdøgrið og ansa tí sjálvi. Hetta, so tit m.a. kunnu læra at kenna tekini hjá barninum, tulka tey og møta teimum.

Tá mamman hevur barnið hjá sær, hevur tað óavmarkaða atgongd til bróstið. Hetta ger at mjólkin setur skjótari til, og barnið fær ta mjólkamongd, tað hevur tørv á.
Vanliga setur mjólkin til 3. - 4. dagin eftir burð, og tá broytist samansetingin í mjólkini, liturin blívur meira hvítur og mjólkamongdin økist.

## Tekin hjá barninum

Ymisk tekin kunnu benda á, at barnið vil súgva. Tey fyrstu tekini eru: skjótar eygnarørslur undir eygnalokinum, flytur armar og bein, súgvirørslur við munn og tungu, leitar, fingrar upp til munnin. Tey næstu tekini eru: Óróligt, grætur av og á. Tey seinnu tekini eru: grátur.

Tað er týdningarmikið, at barnið verður lagt til bróstið, so skjótt sum tað vísir **tey fyrstu tekini** til at vilja súgva/ svongd. Barnið, ið soleiðis verður lagt ofta til, fær ta mjólkamongd, tað hevur tørv á, og mjólkin setur skjótari til.

## K-vitamin



Allir nýføðingar fáa í seinasta lagi 2 tímar eftir føðing eina sproytu við K-vitamin.

## PKU

Millum 48 - 72 tímar eftir burð verður ein blóðroynd (PKU) tikin av barninum. Um tit eru farin heim áðrenn, fáa tit blóðroyndarseðilin við tykkum, og blóðroyndin kann takast ambulant.

## Vekt

Vanligt er, at barnið verður vigað, tá tit fara heim.

## Innleggingar- og útskrivingarsamrøða

Røktarstarvsfólkið hevur eina innleggingar- og útskrivingar samrøðu við tykkum um m.a. bróstageving og praktiska kunning. Mett verður, í samráð við tykkum, nær mamma og barn væntandi kunnu fara heim. Um hetta er fyrsta barnið, mæla vit til at bíða við at fara heim, til mjólkin er sett til.

Ynskiligt er, at tit fara heim áðrenn kl. 11 á útskrivingar-degnum.

## Hoyrikanning/skreening

Hoyriklinikkin bjóðar at kanna hoyrnina hjá øllum nýføðingum. Besta kanningarúrslit fæst 72 tímar aftaná føðing og til 1 mðr. aftaná. Tit fáa eitt skriv um hetta frá Føðideildini.

Tit eru vælkomin at ringja og biðja um tíð á Hoyriklinikkini á tlf. 304512 millum kl.9 og 12.



## Hvíld

Hvílitími er kl. 13 - 15. Tá er ynskiligt, at friður er á stovunum. Barnið hevur tørv á mammuni bæði nátt og dag, og tí ræður um, at fáa hvíld, eisini fyri at mjólkin skal seta til og varðveitast, tá hon er sett til. Hvíl teg tá barnið svevur, og brúka hvílitíman til júst hetta.

Vit mæla til, at allir pápar fara út av stovunum og møguliga ansa eftir barninum, meðan mamman hvílir. Nýtið dagligstovuna.

## Undirvísing á deildini

Hvørt kvøld kl. 20.30 verður filmur um bróstageving vístur í dagligstovuni. Prát og vegleiðing verður eftir tørvi.

## Eftirføðingarvenjing og vegleiðing

Eftirføðingarvenjing og vegleiðing er hvønn gerandisdag kl. 12.30 - 13.00 hjá fysioterapeuti á Fysioterapideildini.

## Vitjan á deildini

Vit royna at gera okkara til, at pápin kann vera innlagdur saman við mammuni á deildini ta fyrstu náttina eftir at barnið er føtt. Teir fysisku karmarnir á Føðideildini loyva tíverri ikki altíð hesum.



Teir komandi dagarnar er pápin vælkomin at verða á deildini (kl. 9—22) og hevur soleiðis møguleika at vera við til at ansa barninum, læra tað at kenna o.s.fr. Ynskiligt er, at pápar **ikki** eru á stovunum aftaná kl. 21. Tá er møguleiki at nýta dagligstovuna. Eisini mæla vit til, at dagligstovan verður nýtt í hvílitímunum (kl.13-15).

Um pápin av einhvørjari orsøk ikki er tilstaðar, kann annar avvarðandi vera hjástaddur og vera við til at til at hjálpa og stuðla mammuni.

Um fleiri liggja á stovuni, vilja vit heita á tykkum um at vísa umhugsni fyri hvørjum øðrum.

Øll onnur vitjandi verða biðin um at halda seg til ta vanligu vitjanartíðina.

Vegna smittuvanda (barnasjúkur, virus o.a.) skulu børn (undir 15 ár) ikki verða á deildini. Undantikin eru frísk systkin, sum kunnu vitja í vitjanartíðini.

Vitjan á pinskustovuni og barnastovuni er bert loyvd eftir avtalu við starvsfólkið.

## Vitjanartíð

Vitjanartíð er millum kl. 15 - 16 og 19 - 20

## Fyrispurningar frá avvarðandi

Starvsfólkið á Føðideildini hevur tagnarskyldu, og svarar tískil bert fyrispurningum frá tykkara nærmastu, í samráð við tykkum.



## Fartelefon, fartelda, ipad

Føðideildin hevur tráðleyst net, sum tit kunnu nýta. Ikki er neyðugt við loyniorði. Tit eru vælkomin at hava omanfyristandandi við. Hugsað tó um hinar mammurnar á stovuni. Fartelefonin skal tó ikki nýtast á føðistovuni. Telefonin skal vera ljóðleys, og ráðiligt er, at hon ikki liggur í vøgguni hjá barninum.

Sambandið við nýfødda barnið er sera umráðandi. Nýføðingar mennast m.a. gjøgnum eygnasamband, prát, at

verða hildin um o.s.fr. Tískil mæla vit tykkum til at nýta farteldu, ipad og líknandi minst møguligt. Brúka tíðina/ orkuna uppá at tosa við barnið, læra tað at kenna, tulka tekini og møta teimum. Vit vilja heita á mammuna, at hvíla teg, tá barnið svevur.

## Virðislutir

Virðislutir hevur ein sjálvur ábyrgd av.

## Royking

Tað er ikki loyvt at roykja á Landssjúkrahúsinum.

## Reinføri

Reingerðarfólk tekur sær av dagligari reingering á deildini. Fyri at lætta um arbeiðið og fyri at tryggja gott reinføri, mæla vit til, at klæðir og lutir ikki verða løgd í vindeyga ella á gólvið, men í klædnaskápið ella í náttborðið.



## Máltíðir

| | |
|---|---|
| Morgunmatur | kl. 08.30 - 09.15 |
| Døgurði | kl. 11.30 - 12.15 (verður borðreiddur) |
| Drekka | kl. 14.00 - 14.30 |
| Nátturði | kl. 17.30 - 18.15 |
| Drekka | kl. 20.30 - 23.30 |

Maturin er einans til mammurnar - tó undantikið pápar/ onnur avvarðandi, um avtala er gjørd við røktarstarvsfólkið.

Borðið, við matinum á, stendur á gongini. Drekka kl.20.30 stendur í dagligstovuni. Eitt kuldaskáp stendur á gongini, har tit kunnu seta eitthvørt etandi/leskandi.

## Upplatingartíðir hjá sølubúðini í forhøllini

Gerandisdag kl. 8 - 20, Leygardag kl. 10- 20, Sunnudag kl. 14.30 - 20. Sølubúðin er stongd: Langafríggjadag, páskadag, hvítusunnudag, ólavsøkudag, jólaaftan, jóladag, nýggjársaftan og nýggjársdag.

Avvarðandi eru vælkomin at fara oman í sølubúðina at keypa sær eitthvørt leskandi.

Sí meira kunning “her”

Egnar viðmerkingar:

Egnar viðmerkingar:

## At hava við

- Faldaran “Vælkomin á Føðideildina”
- Ferðajournalina
- Vígslubræv ella dóps/navnabræv
- Alt til persónligt reinføri
- Góðan brósthaldara, helst uttan boyla
- Inniskógvar
- Klæðir at vera í, tá tú ert uppi

### Meira kunning:

Møguleiki er at ogna sær app´ina “Gravid” hjá heilsustýrinum— “her”

### Viðkomandi leinkjur:

Heilsugóðir vanar—áðrenn, undir og aftaná barnsburð “trýst her” ella á enskum “trýst her”